## Rangers skrivaði søgu

Fyri fyrstu ferð síðani 1894 eydnaðist tað Rangres at skora fýra mál, tá teir spældu á útivølli ímóti Celtic. Old Firm dystirnir millum Celtic og Rangers eru størstu fótbóltsdystirnir í Skotlandi. Úrslitið av dystinum var 4-2 til Rangers. Bæði Celtic og Rangers fingu ein spælara vístan av vøllinum í dystinum.



## Nygaard aftur á landsliðnum

Marc Nygaard, sum hevur ættarbond á Tvøroyri, er tikin út til danska fótbóltslandsliðið, sum skal spæla fyrstu dystirnar í nýggjari HM-undankapping. Marc Nygaard hevur áður spælt á landsliðnum, men tað eru liðin seks ár, síðani hann seinast varð úttikin. Nú hevur Marc Nygaard gjørt um seg í álopinum hjá danska felagnum Randers, og tað hevur sannført Morten Olsen um, at Nygaard hoyrir heima á landsliðnum.




*B68 beit av álvara frá sær. Men tað eydnaðist tó hjá EB/Streymi at toga tíggjunda heimasigurin til høldar, og enn er kósin púrasta bein móti FM-gullinum*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Sundalagið brynjar seg til gullveitslu

**Fyri 10. fer upp í slag í hesum kappingarárinum vann EB/Streymur á heimavøllinum við Margáir. Spurningurin er ikki longur, um føroyameistaraheitið endar í Sundalagnum – men nær tað kemur í hús**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Í Sundalagnum fara tey nú so smátt at brynja seg til gullveitslu. EB/Streymur hevur beina kós móti føroyameistaraheitinum, og óttin fyri, at tað miseydnast aftur í ár er burtur. Spurningurin er ikki, um sundalagsmenn fáa gull – men heldur nær teir fáa tað.

*EB/Streymur*

*B68*

Í gjár kom EB/Streymur eitt fet nærri gullkrónunum. Á heimavøllinum við Margáir vunnu teir fyri 10. fer upp í slag í hesum kappingarárinum, tá toftamenn vitjaðu.

### Vendu aftur

Seinasta vikuskiftið vitjaðu sundalagsmenn á Sandi. Tá vendu teir einum hóttandi ósigri til sigur, og somuleiðis var myndin við Margáir í gjár. Hóast Ahmed Keita legði gestirnar úr B68 á odda, so eydnaðist tað aftur EB/Streymi at fáa fult.

Sorin Anghel javnaði eftir einum hálvum tíma. Bólturin rullaði til mann frá manni, áðrenn Bárður Olsen, sum røkti vongverjaplássið í høgru, sendi inn. Hans Pauli Samuelsen legði bóltin til rættis fyri framherjan, sum smekkaði í netið. Níggju minuttir seinni legði Hans Pauli Samuelsen sundalagsmenn á odda við frálíkum beinleiðis frísparki.

Leikliga var heimaliðið ikki sannførandi. Og tað hevur verið eitt av eyðkennunum hjá teimum bláu og svørtu úr Sundalagnum í hesum kappingarárinum. Spælið hevur als ikki verið í meistaraklassa, men tá tað næstan hvørja ferð eydnaðist at skjóta fleiri mál enn mótstøðuliðið, so kunnu áskoðararnir ikki verða ónøgdir. Soleiðis er eisini í ár.

### B68 nær bjargingini

B68 hevði veruliga fingið vind í seglini seinastu vikurnar. Liðið lyfti seg úr botninum, og toftamenn eru, hóast ósigurin í gjár, ikki í trupulleikum í løtuni. Nú liðini undir B68 á stigatalvuni taptu í gjár komu toftamenn heldur eitt fet nærri bjargingini.

Tá Ahmed Keita eftir 18 minuttum sendi høvdið á eitt innlegg úr vinstru, og legði gestirnir á odda, var tað somuleiðis hansara triðja mál í hesum kappingarárinum. Tað er sjálvandi ikki nóg mikið, serliga tá hugsa verður um, at hann heldur sera evnaríka Jóan Símun Edmundsson á beinkinum. Tað skal tó sláast fast, at ungi framherjin ætlandi skuldi byrja í gjár, men bleiv skaddur undir upphitingini. Tilgongdin av Brian Andresen í summarsteðginum hevur bøtt um tað leikliga hjá toftamonnum, og danin hevur roynst væl sum bindilið millum miðvøll og álop.

B68 royndi av øllum alvi at trýsta seinastu løtuna í gjár. Tað var eisini nær við, at gestirnir fingu útjavnandi málið, men heimaliðið stóð ímóti.

### Gull til EB/Streym

Tann 25. oktober fer EB/Streymur at taka ímóti gullheiðursmerkjum og steypinum. Tá vitjar HB í seinasta leikumfari við Margáir. Sundalagið kann nú so smátt byrja at fyrireika gullveitsluna, tí nú kann ikki ganga galið. 10 stig eru til NSÍ, sum er á øðrum plássi, og 18 stig eru eftir at spæla um. Tað kann snøgt sagt ikki bera til, at tað verður annar føroyameistari.

Tí fer Sigfríður Clementsen aftur at skriva føroyska fótbóltssøgu. Dugnaligi venjarin, sum hóast sín unga aldur hevur royndt eitt sindur av hvørjum, vann, sum tann fyrsti, eitt føroyskt felag viðari í altjóða kapping. Nú vinnur hann, eisini sum tann fyrsti, eitt føroyameistaraheitið til EB/Streym.

## Væl longri millum málini

Í EB/Streymi hava tey verið serstakliga fegin um mongu málini, sum rumenin Sorin Anghel hevur skotið í bláu og svørtu troyggjuni. Síðan aldarskiftið hevur hann oftast verið toppskjútti í Sundalagnum. Men nú eru tíðirnar broyttar.

Tá Anghel í gjár javnaði fyri heimaliðið var tað bara hansara næsta mál í ársins útgávu av Formuladeildini. Rumenin hevur fingið meira verjukendar uppgávur á liðnum, og hvat málum viðvíkur, stendur nú fyrrverandi málrevurin í skugganum av Arnbirni Hansen.

Tað hevur verið tikið skemtandi til, at Sorin Anghel, sum hevur stóran týdning í Sundalagnum, er einasti eiðismaðurin hjá EB/Streymi. Rumenin kom til Føroya í 2001, og hevur tí verið partur av stóru broytingini í felagnum seinnu árini. Ja, saman við Marna Djurhuus er hann faktist hin einasti.

**-uhj**